# Óarbeiðsføristrygging

## Óarbeiðsføristrygging

Vit bjóða tær at víðka tína Samlagstrygging ella Restskuldartrygging til eisini at fevna um Óarbeiðsføristrygging, og sum sostatt kann tryggja tær eina mánaðarliga skattafría inntøku, so leingi óarbeiðsførið varar, tó í mesta lagi til tú nært fólkapensjónsaldri.

## Hvør kann tekna Óarbeiðsføristrygging?

Tryggingin fyri óarbeiðsføri verður teknað sum ískoyti til eina Samlagstrygging ella til eina Restskuldartrygging. Tað er tí ein treyt fyri at tekna tryggingina fyri óarbeiðsføri, at tú eisini hevur Samlagstrygging ella eina Restskuldartrygging frá LÍV við eini tryggingarupphædd á í minsta lagi 575.000 kr.

Harumframt skalt tú vera millum 18 til og við 50 ár og tú skalt útflýggja eina nøktandi heilsuváttan. Tryggingarfulnaðurin heldur uppat, tá tú nært fólkapensjónsaldri.

## Prísur og tryggingarupphæddir

Veitingin fylgir mótrokningarmarkinum, ið Almannaverkið ásetur á hvørjum árið. Veiting og tryggingargjald kann broytast árliga. Gjaldið verður skuldskrivað mánaðarliga.

Hevur tú valt, at tryggingargjaldið skal takast av eftirlønargjaldinum, kann samlaði kostnaðurin fyri allar tínar tryggingar í mesta lagi vera 1/3 av móttikna eftirlønargjaldinum.

| Tryggingarupphædd | Gjald um mánaðin |
|---|---|
| 99.600 kr. | 419.00 kr. |

## Útgjald

Óarbeiðsførisveitingin verður útgoldin, um arbeiðsførleiki tín verður skerdur 2/3 ella meira. Óarbeiðsførisveitingin byrjar 3 mánaðir eftir, at óarbeiðdsføri er staðfest.  Goldið verður hvønn mánað frammanundan. Útgjaldið heldur uppat, tá ið tú hevur endurvunnið arbeiðsførleikan til omanfyri ein triðing ella í síðsta lagi, tá ið tú nært fólkapensjónsaldri.

## Skattur

Tryggingargjaldið verður goldið við skattaðum peningi, tá ið tað verður inngoldið. Hetta merkir, at útgjøld fyri óarbeiðsføri eru skattafrí.

Neyvari útgjaldstreytir eru at finna í tryggingartreytunum fyri Samlagstrygging.